# Alonso vann ruðuleika-koyring í Melbourne

**Formil 1 koyringin í Avstralia gjørdist sera spennandi og í stóran mun merkt av ruðulleika. Vit sóu hópin av koyrivillum, tættar yvirhálingar og ikki færri enn fýra ferðir trygdarbilin á breytini. Fernando Alonso slapp tíðliga framvið Jenson Button á fyrsta pláss, og eftir hetta var oddasessurin ongantíð hóttur**



FORMIL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Heimsmeistarin í formil 1 Fernando Alonso í Renault líkist longu eftir tríggjar koyringar einum komandi heimsmeistara 2006. Hetta tá hann sannførandi vann á breytini í Alberts Park mitt innið í Melbourne. Hann hevur 28 stig, hetta er dupult so nógv sum liðfelagin Giancarlo Fisichella og finski McLaren Mercedes koyrarin Kimi Räikkönen hava á einum deildum øðrum plássi. Longu í byrjanini var Alonso, ið byrjaði í triðju byrjunarstøðu, skjótari enn Jenson Button í fyrstu byrjunarstøðu, og hann trýsti bretan fyrstu svingini, áðrenn hann slapp framvið honum, eftir hetta økti hann um munin niður til annað pláss nógvar ferðir, men fýra verðir kom trygdarbilurin á breytina og slettaði munin. Tó var Alonso so sannførandi henda dagin, at hann ikki hevði trupulleikar við at halda oddassessin.

## Fisichella kundi havt avbjóða

Liðfelagin hjá Alonso, Fisichella skuldi byrja næst fremstur, men steðgaði upp í sjálvari byrjanini og noyddist tí at byrja úr pittinum. Hann tyktist annars, sum einasti koyrari á breytini, ið hevði kunna kappast við Alonso um sigurin. Fisichella megnaði at stríða seg fram til sætta pláss, og royndi at sleppa framvið Button seinastu nógvu umførini. Hetta eydnaðist í seinasta svingi, tá motorurin hjá Jenson Button brast í einum eldroki, og bilurin steðgaði 10 metrar frá málstrikuni. Óhepni bretin endaði heilt uttan fyri stigini.

## Sving 2 feldi teir stóru

Fyri Michael Schumacher og Juan Pablo Montoya endaði dagurin í sving 2, har teir steðgaðu upp aftan á koyrivillur. Hetta var sama stað, ið Massa koyrdi útav leygardagin. Michael Schumacher endaðu í vegginum, meðan Montoya megnaði at halda bilin í einum petti, men steðgaði upp í royndini.

Fyri Nico Rosberg, Felipe Massa og Jarno Trulli endaði koyringin á fyrsta umfari. Rosberg, Massa, Christian Klien og Scott Speed stríddust um at sleppa framvið hvør øðrum, hetta endaði koyringina fyri Rosberg og Massa. Eisini Jarno Trulli og David Coulthard stríddust eitt sindur ov nær, og Trulli var trýstur av breytini. Fyri Toyota, ið hava havt eina ræðuliga byrjan av kappingarárinum, gjørdist dagurin annars ikki so galin. Ralf Schumacher megnaði við einum triðja plássi at sleppa á sigursskammilin.

## Ruðuleiki valdaði

Sjálv byrjanin var eisini ein sannur ruðulleiki, fyrst snaraði Montoya runt á breytini í upphitingarumfarinum, men tá Fisichella steðgaði upp í byrjanini, slapp Montoya at endurtaka sítt pláss.

## Steðgaði upp á fyrsta plássi

Mark Webber lá fremstur á heimabreytini, tá hansara motorur gekk fyri. Teir, ið lógu frammanfyri honum høvdu verið í pitt, tí hevði hann fremsta plássið. Oddasessurin hevði verið tíðaravmarkaður. Men tá søgan verður skrivað, so endaði avstraliumaðurin koyringina við tøkniligum trupulleikum, meðan hann lá á odda fyri avstralsku koyringina.

## Scott Speed misti stigið

Amerikumaðurin Scott Speed endaði koyringina á 8. plássi, men av tí at hann hevði koyrt framvið David Coulthard meðan veittrað varð við gulum trygdarfløggum, so fekk hann 25 sekund løgd afturat tíðini, hetta flutti hann niður á 11. pláss. Hann var als ikki nøgdur við hesa avgerð, og endaði við at fáa $5000 í bót, fyri at vera ófantaligur í munninum.

### Úrslitið í Melbourne

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso - Renault | 10 |
| 2. | Kimi Räikkönen - McLaren-Mercedes | 8 |
| 3 | Ralf Schumacher - Toyota | 6 |
| 4 | Nick Heidfeld - Sauber-BMW | 5 |
| 5 | Giancarlo Fisichella - Renault | 4 |
| 6 | Jacques Villeneuve - Sauber-BMW | 3 |
| 7 | Rubens Barrichello - Honda | 2 |
| 8 | David Coulthard - RBR-Ferrari | 1 |
| 9 | Jenson Button - Honda | |
| 10 | Christijan Albers -MF1-Toyota | |
| 11 | Scott Speed - STR-Cosworth | |
| 12 | Takuma Sato -Super Aguri-Honda | |
| 13 | Yuji Ide - Super Aguri-Honda | |
| - | Juan Pablo Montoya McLaren-Mercedes | |
| - | Tiago Monteiro MF1-Toyota | |
| - | Vitantonio Liuzzi STR-Cosworth | |
| - | Michael Schumacher Ferrari | |
| - | Mark Webber Williams-Cosworth | |
| - | Christian Klien RBR-Ferrari | |
| - | Jarno Trulli Toyota | |
| - | Nico Rosberg Williams-Cosworth | |
| - | Felipe Massa Ferrari | |

### Støðan í formil 1 kappingini fyri koyrarar

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso | Spania | 28 |
| 2 | Kimi Räikkönen | Finnland | 14 |
| - | Giancarlo Fisichella | Italia | 14 |
| 4 | Michael Schumacher | Týskland | 11 |
| - | Jenson Button | Ongland | 11 |
| 6 | Juan Pablo Montoya | Kolumbia | 9 |
| 7 | Ralf Schumacher | Týskland | 7 |
| 8 | Nick Heidfeld | Týskland | 5 |
| - | Jaques Villeneuve | Kanada | 5 |
| 10 | Felipe Massa | Brasilia | 4 |
| 11 | Mark Webber | Avstralia | 3 |
| 12 | Nico Rosberg | Týskland | 2 |
| - | Rubens Barrichello | Brasilia | 2 |
| 14 | Christian Klien | Eysturríki | 1 |
| - | David Coulthard | Skotland | 1 |

### Støðan í formil 1 kappingini fyri lið

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Renault | 42 |
| 2 | McLaren-Mercedes | 23 |
| 3 | Ferrari | 15 |
| 4 | Honda | 13 |
| 5 | Sauber BMW | 10 |
| 6 | Toyota | 7 |
| 7 | Williams-Cosworth | 5 |
| 8 | Red Bull Racing Ferrari | 2 |


# FINNIÐ BÓLTIN

Saman við Atlantic Airways lutar Sosialurin í ár ikki færri enn 13 flogferðaseðlar á rutunetinum hjá Atlantic. Ein vinnari verður hvørt umfarið í Formula-deildini

Møguleikarnir fyri flogferðum úr Føroyum hava ongan tíð verið so stórir, sum teir verða tað í ár. Við fimm flogførum í støðugari flúgving eigur Atlantic Airways sín stóra lut í øktu valmøguleikunum, og nú kanst tú saman við Sosialinum og Atlantic verða partur í nøkrum av mongu fráferðunum.

Eftir hvørt umfarið í Formula-deildini verður ein mynd at síggja her í blaðnum, har vit hava »sletta« bóltin úr myndini. Uppgávan hjá lesaranum er so at gita, hvar hesin bólturin eigur at vera.

Við at senda SMS-boð á 1441 ber til hjá lesarunum at vera við í kappingini, har Atlantic Airways hevur eina flogferð tøka eftir annaðhvørt av teimum 27 umførunum í Formula-deildini.

Heldur tú, at bólturin er í teigi 1, skal teksturin í SMS-boðnum vera »hvar 1«. Soleiðis skal hvørt boðið bara innihalda orðið »hvar« og so nummarið á teiginum, har tú heldur bólturin eigur at vera.

*Kostnaðurin fyri at senda boðini er 5 krónur umframt vanligan SMS-takst.*

ATLANTIC AIRWAYS






**Hvar er bólturin?**

Hvar heldur tú, at bólturin er? Við at senda eini SMS-boð til 1441 kanst tú vera við í lutakastinum um eina ferð á rutunetinum hjá Atlantic Airways. Skrivað hvar og so nummarið á teiginum, har tú heldur bóltin vera.